# Nú eru tey her, strok-snillingarnir úr **Helsinki**

## Og hvat fara tey so at spæla fyri okkum?

**Jú, tilsenda skráin sær soleiðis út:**

*Jean Sibelius*
*Suite champètre, opus 98b*
*I: Piece carácteristique*
*II: Mélodie élégiaque*
*III: Danse*

*Pyotr Tschaikovsky*
*Serenade for Strings in C Major, opus 48*
*I: Pezzo in forma di Sonatina*
*II: Walzer*
*III: Elégie*
*IV: Finale*

*Steðgur*

*Carl Nielsen*
*Ved en ung Kunstners Baare*

*Béla Bartok*
*Divertimento*
*I: Allegro non troppo*
*II: Molto adagio*
*III: Allegro assai*

Harumframt verður tónleikur eftir gitna norðmannin Grieg og tónleikur eftir finska nútíðartónaskaldið



Sonninen eisini at hoyra. Áhugavert man vera at nevna, at eisini nakrir av úrvaldu strúkarunum úr Tórshavnar Musikkskúla fáa høvi at spæla við í hesum gitna orkestri í pørutm av skránni.

Fremsta tónaskald finnlendinga Jean Sibelius (1865 – 1957) vitjaði Stórabretland fyri seinasu ferð árið 1921 á einari stórari konsertferð við mongum framførslum, har hann sjálvur stjórnaði egin verk. Á vitjanini undirskrivaði hann sáttmála við forlagið Chappel & Co, sum hann seinni skrivaði tvær svitur fyri kamarorkestur til, ið fingu opusnummarið 98. Tann seinna av teimum, Suite Champètre, er skrivað fyri strúkiorkestur. Forleggjarin, sum ivaleyst hevði væntað sær eitt størri verk, sendi handritið aftur. Sibelius skrivaði í sína dagbók:" Chappelen bakkaði við einum súrligum skrivi. Hann hevur ikki "rúm fyri fyri einari nýggjari svitu". Hetta hevur glett meg, tí hon var ikki Jean Sibelius nóg virðilig.- Hvussu mín fíggjarstøða skal bjarga sær, tað viti Gud."

Sibelius hevði tó ikki ráð til at vraKa svituna. Hann seldi hana til forleggjaran Wilhelm Hansen, og hon fekk sína frumframførslu á somu konsert, har hansara sætta symfoni fekk sína í 1923. Sjálvsatfinning Sibeliusar var enn einaferð ov strong, tí svitan eigur sína serstøku sjarmu. Fyrsti satsur minnir bæði í rytmu og samljóði um Tjajkovskij. Men í tí hóvliga øðrum satsi er tað so eyðkennt, hvør komponisturin er. Tann káta finalan er ein stutt humureske fyri solofiól og strúkarar.

"Serenadefor Strings" gevur til kennar, hvussu hugtikin Pjotr Tjaikovski ( 1840 – 1893) var av klassisismunu og serliga av Mozart. Hon er skrivað í 1880 og varð frumframførd árið eftir við Tjaikovski sjálvum sum leiðara. Hon gjørdist eisini partur av føstu skánni hjá tónaskaldinum á hansara konsertferðum víða um í Europa.

Fyrsti satsur er leysliga skipaður í sonatuformi. Annar satsur er tann gitni Tjaikovski-valsurin, ein perla innan klassiska tónleikin. Triði satsur er eitt kensluborið sorgarljóð, og seinasti satsur byggir á tvey russisk fólksløg. Inngangstemaið í fyrsta satsi vendir aftur innan stásisliga endaspurtin.

Tjaikovskij segði sjálvur um sítt verk:"Eg skrivaði serenaduna av einari innari trongd. Hon kemur frá hjartanum, og eg tori at siga, at henni vantar ikki virðileika".

Carl Nielsen (1865 – 1931) vitjaði regluliga harragarðin Fuglsang, ein fagur miðdepil fyri list og tónleik á oynni Lolland. Har í slotsparkini var lítil summarsmáttu honum altíð tøk. Á Fuglsang lærdi Nielsen unga, gávuríka listamálaran Oluf Hartmann at kenna. Í árinum 1910 andaðist Hartmann brádliga, bert tríati ára gamal. C. Nielsen skrivaði eitt kensluborið tónaverk, eina Andante lamentoso við hjáheitinum Ved en ung Kunstners baare til jarðarferðina.

Hetta tónaverkið varð eisini framført til jarðarferðina hjá Carl Nielsen sjálvum.

Divertimentoið var seinasta verkið hjá Béla Bartok (1881 – 1945), áðrenn hann flutti til USA at búgva. Fyrsti satsur er skrivaður í sonatuformi. Tann summarsliga divertimento-kenslan broytist brádliga av rytmiskum tónaendurtøkum og dramatiskum herðindum í hæddarløtum, sum peika frameftir móti tí sorgkenda millumsatsinum.

Annar satsur (Molto adagio) er í snarpari andstøðu til teir ytru satsarnar – kundi kanska verið lýstur sum dularfull sjón at jarðarfylgi á náttartíð. Hann hýsir tveimum eyðkennum fyri hóvligu satsirnar hjá Bartok: sorgarmarsjin og "náttartónleikin". Óttafulli, vónleysi tónadámurin dregur hugan móti teim kenslum, sum Bartok gav til kennar í skrivligum lýsingum av tíðini: ótta hansara fyri krígnum og hansara stúran fyri framtíðini hjá Europa.

Triði satsur (Allegro assai) er í sínum tema í ætt við fyrsta sats, men í andstøðu móti tí elegantu og máttmiklu nýtsluna av huglagnum í ungarska verdbunk-dansinum, er finalan kvik, rondokend og fólkadansiliga frødlig.











